# skip verður søkt



*Mynd. Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Okey, vaknaðu menn ikki beinanvegin, so rísnaði málið og tað er ein onnur søga

Tankarnir eru aftur umborð á "Sjóvartúni". Eg síggi Sofus á Sýnuni fyri mær. Vit høvdu eitt flott summar saman við pápa umborð á Sjóvartúni á landleiðini í 1987. Sofus er heldur ikki millum okkum meira, eg gloymi ongantíð aftur hetta vakra summarið, tá íð sólin setti og litaðI majestætiska Mýling, Saksunnarlandið Vestmannabjørgini og undurfullu Vágoynna fyri norðan. Hetta var eisini eitt av teimum stóru summrunum hjá Sofusi. Eg síggi Andrias farbróður fyri mær, sum var við allarfyrstu tíðina, og tá var hann blivin ein gamal maður. Tað var ein sovorin hugni kring hann og pápi og hann vóru ógvuliga góðir brøður, so ólíkir teir annars vóru. Hann er eisini farin. Viðsíðuna av mær, her eg standi, eru restirnar av neystinum hjá Andriasi, sum hann bygdi í sínum ungdómi. Her hevði hann handil á sínum ungu árum. Alt hevur sína tíð, messar Prædikarin. Hvat hann meinar við er eyðsýnt.

Og hvar man pápi vera í øllum hesum. Hann liggur eisini inni á Línheyggi, í kirkjugarðinum við gravsteini yvir enni. Einum gravsteini, sum hann sjálvur fann til at prýða havan við. Heilt erligt, pápi var so mikið lívsglaður maður, at hann gekk ikki og leitaði eftir gravsteini til sín sjálvs. Man hann venda sær í grøvini, nú far hans er á veg út í dýpið at søkkjast. Nei, hugsi eg, vit flyta okkum nokk ikki ein tumma, eftir at jarðisku restirnar eru farnar undir svør. Øll mín kristna trúgv rópar eftir, at tá íð eyga brestur, so er sálin á ferð til ein betri stað, til eitt land, har sólin aldrin setir. Og har uppi trúgvi eg onki uppá, at pápi, ella nakar annar gremist um eitt 57 ára gamalt skip, sum ongin hevur brúk fyri longur, og sum bert er til ampa fyri øðrum framburði. Jarðiskar og materiellar spekulatiónir røkka ikki upp í himmalin, men uttan iva tosa Sofus og pápi um stórar løtur umborð á "Sjóvartúni", nú grøvin nærkast fyri norðan. 57 ár, hvat er tað í ævinleikanum. Og Paulus minnir okkum á í fyrra Korint 13, at meðan vit bara síggja í pørtum, so síggja tey fyri handan allan samanhangin. Útsýnið hjá Sofusi og pápa er so nógv víðari enn okkara nú.

"Hetta er sum til eina jarðarferð," sigur ein rødd aftanfyri meg. Tað er Leo í Billustovu, sum er komin oman á bátadráttin at siga farvæl. Pápi og hann vóru næstan javngamlir og nú er hann á veg til Oyrar at vaska. "Fiskibátur var," leggur hann afturat.

Og niðri í Sjóvartúni, tað er oman móti støðni niðri við kirkjuna í Oyndarfirði, standa eisini menn og fylgja bátinum, sum var uppkallaður eftir hesum fongríka stað, meðan hann alt gerst minni, sohvørt sum fjarleikin økist.

"Dýpið í Djúpunum er einki annað enn ein kirkjugarður. Har liggja ein rúgva av gomlum sluppum, serliga fuglfjarðarsluppum," sigur Heini Dahl, sum er komin oman. Hann hevur eisini havt sínar løtur umborð á Sjóvartúni.

Tað dregur um Velfararstein, beint niðanfyri okkum, ut fyri Støðni. Sjógvin kring Velfarastein nýttu teir til at meta seg eftir hvussu tað var sjóvað longur úti. Nú fer "Fiskivarði" undir norði á Stongini og eina litla løtu sær tað út sum "Sjóvartún" siglir einsamallur sjálvur við ongum manni umborð, so hvørvur hann.

Lívið er deiligt og menniskjan er praktisk. Beint áðrenn teir loystu spurdi eg Fróða, beiggja mín: "Hvar fara til at søkkja hann." Hann hugsaðI seg eitt sindur um: "Eg veit ikki rættuliga, vit hava eina positión, men vit fara í hvussu er ikki at søkkja hann so hann ger fortre fyri nakrari línu," og hetta seinasta legði hann áherslu á, sum tann línumaður hann er í dag.

Lívið er eisini fullkomiliga óútrokniligt. Eg droymdi ikki um í morgun, at mamma skuldi enda í einum ferðsluóhappi á Fjarðarvegnum, sum hon Harrin havi lov, slapp óskalað frá, meðan bilurin gjørdist vrak, og at "Sjóvartún", sum hevði fylt so nógv í okkara familju seinstu 20 árini, varð søktur sama dag.

Eg koyri hugsunnarsamur út aftur á Hellurnar, og hugsi um eg skal koyra til Elduvíkar fyri at vita um eg síggi hann verða søktan. Tó nei, eitt farvæl er eitt farvæl og eitt farvæl er næstan altíð eisini eitt góðan dag til nakað nýtt og spennandi.

Her er einki annað at gera enn at fara aftur til knattaborðið.

Norðanfyri liggur "Sjóvartún" á botni og hansara nýggi leiklutur er at vera friðskjól fyri fiski, sum hevur tað tvørligt i hesum fiskidagatíðum og so hevur hann eisini leiklutin sum karmurin um teir menn, vit minnast, sum høvdu við hetta skip at gera.



*"Sjóvartún" er sleipaður út úr havnini av alibátinum við Sólbjørn Klein sum skipara.*

*Mynd: Jústinus Leivsson Eidesgaard*